STARVSLÝSING

# Kontrollari til fíggjardeildina á Landsverki

Søkt verður eftir kontrollara til Landsverk at byrja 1. mars ella skjótast til ber.

**Starvið**
Høvuðsuppgávan hjá fíggjardeildini er at fyriskipa og samskipa fíggjarligu viðurskiftini á stovninum og at hava eftirlit við, at innan- og uttanhýsis játtanirnar halda.

Sum kontrollari kemur tú sertakliga at varða av:

- eftirliti við byggiroknskapum
- váðameting av verkætlanum
- eftirliti við avtalugrundarlagi
- eftirliti við faktureringsætlanum
- eftirliti við, at játtanir verða hildnar
- og øðrum fyrifallandi uppgávum á fíggjardeildini

**Førleikakrøv**
Tú hevur viðkomandi hægri útbúgving innan roknskap. Til dømis HD, HA ella cand.merc. Ert tú verkfrøðingur ella líknandi við eftirútbúgving og drúgvum royndum innan roknskap, eru vit eisini áhugað at hoyra frá tær.

Royndir innan oman fyri nevndu uppgávum og/ella innan grannskoðan er ein fyrimunur. Haraftur-at er tað fyrimunur at hava innlit í byggivinnuna, byggiløgfrøði og gongdina í byggiverkætlanum.

Tú dugir at varðveita yvirlitið, men evnar eisini at fara niður í smálutir. Tú ert førur fyri at seta kritiskar spurningar umframt at eftirkanna og meta um roknskaparligu mannagongdirnar. Sum persónur ert tú diplomatiskur og samstarvandi. Tú dugir væl at lurta eftir fólki, men tú ert eisini áhaldandi og megnar at skera ígjøgnum, tá tað er neyðugt.

**Setanarviðurskifti**
Løn og setanartreytir annars verða sambært sátt-málanum millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag. Arbeitt verður skiftitíð.

**Umsóknir**
Umsókn við prógvum og lívsgongdarlýsing (cv) verður at senda til lv@lv.fo og skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 31. januar 2010, kl. 08.00. Merk umsóknina „*Kontrollari*“.

Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Árant Andriasson, fíggjarleiðara, á telefon 290 821 ella við at senda ein teldupost til arant@lv.fo

SENDISTOVAN

*Landsverk er undir Innlendismálaráðnum og hevur um hendi vega- og havnamyndugleikauppgávur og byggiharrauppgávur. Stovnurin ger ætlanir, útinnir, rekur og viðlíkaheldur landsvegir, havnir, bygningar og flogvallamál, herundir tyrlupallar.*

*Við umleið 140 starvsfólkum er Landsverk ikki bert ein av størstu almennu stovnunum í Føroyum, men eisini millum teirra, sum hevur størstu serfrøðina savnaða undir sama taki.*

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postsmoga 78, 110 Tórshavn | Tel. 340 800, Faks 340 801, lv@lv.fo, www.landsverk.fo

LANDSVERK *byggir land*

KAVARASKEIÐ · KAVARATÚRAR · SØLA AV KAVARAÚTGERÐ · LEIGA AV KAVARAÚTGERÐ



## Vinnukavara- & Kavarahjálparaskeið byrjar 1. februar 2011

1. februar 2011 skipar Faroe Dive aftur fyri vinnukavaraskeiði og kavarahjálparaskeiði. Við hesum útbúgvingum fáa næmingar okkara vinnubræv frá arbeiðseftirlitinum, sum ávika vist SCUBA vinnukavarar og sum kavara- hjálparar.

**Á vinnukavaraskeiðnum skulu næmingar okkara m.a.**

- Gjøgnumganga 10 ymisk evnir innan kaving í skúlastovu
- Loysa og lata inn skrivligar uppgávur
- Kava minst 20 kav við ymiskum arbeiðsuppgávum millum 0m og 30m.
- Áðrenn endaligu royndinar hava minst 900min samlaða botntíð
- Standa praktiska-, teoretiska- og endaliga munnligu royndirnar við nøktandi úrslitið

Um tú hugsar um at gerast vinnukavari ella kavarahjálpari, so send okkum ein teldupost. Ella kom inna á gólvi hjá okkum við **Nólsoyar Pálsgøtu 38, í Klaksvík**, týskvøld og hóskvøld millum kl.1800 og kl.2100.

**Luttøkukrøv Vinnukavaraskeið:**
18ár • Góðkent fyrstuhjálpar skeið • Heilsuváttan til vinnukavarar • Væl fyri kropsliga og sálarliga • Grundleggjandi rokni førleika

**Luttøkukrøv Kavarahjálparaskeið:**
18ár • Góðkent fyrstuhjálpar skeið

FAROE DIVE.fo



Mylnugøta 17 · 700 Klaksvík · Faroe Islands · www.faroedive.fo · faroedive@faroedive.fo · tlf. 218929 / 224224



# SØLUFÓLK
## til útflutningsmarknaðin

**Trol- og nótavirkið Vónin søkir eftir dugnaligum sølu-fólki til at røkja eitt sera spennandi og fjølbroytt starv, sum fevnir um allar tættir innan sølu av aliútgerð til útflutningsmarknaðin. Arbeiðsstaðurin verður á deild okkara á Norðskála, tó verður ferðing uttanlanda ein týðandi partur av arbeiðinum.**

**Førleikar**
Vit vænta, at tú ert køn/ur í enskum í bæði skrift og talu, og tað er ein fyrimunur, um tú eisini dugir spanskt. Tú mást hava teldukunnleika á brúkarastøði, og eigur tú at vera før/ur fyri at leggja søluarbeiðið væl til rættis.
Tað er umráðandi, at tú dugir at seta teg inn í nýggj viðurskifti, kanst loysa uppgávur sjálvstøðugt og hevur góð evnir til at samskifta við viðskiftafólk og starvs-felagar.
Vit ímynda okkum at tú hevur kunnleika til alivinn-una, men hetta er tó ikki nakað krav.

**Starvstreytir**
Lønarviðurskifti og setanartreytir verða sambært avtalu við leiðsluna.

**Umsókn**
Vilt tú vita meiri um starvið ert tú vælkomin at ringja til Signar Poulsen á telefon 222026. Skrivlig umsókn við CV, prógvum og møgu-ligum viðmælum eigur at vera okkum í hendi í seinasta lagi **23. januar** og skulu stílast til:

VÓNIN®

Postboks 19 | Bakkavegur 22 | FO-530 Fuglafjørður

*VÓNIN*
er ein av heimsins fremstu trol- og nótaframleiðarum við 10 deildum í Føroyum, Grønlandi og Kanada. Hjá Vónini starvast millum 110 –120 fólk.
**www.vonin.com**

